# Jóhan vann á Alfred



**Fríggjakvøldið var fyrri parturin av landsfundinum hjá Sambandsflokkinum. Mest spennandi punktið á skránni var val av næstformanni, tí at Jóhan Dahl stillaði upp móti sitandi formanni, Alfred Olsen. Jóhan Dahl vann valið greitt við 29 atkvøðum móti 17 til Alfred**

NÆSTFORMANSVAL
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Fríggjakvøldið og leygardagin var landsfundurin hjá Sambandsflokkinum í Hósvík. Fríggjakvøldið stóð Alfred Olsen, næstformaður, fyri valið.

Fundurin byrjaði við, at Kaj Leo setti fundin sera stutt og bað einans vælkomin og lýsti fundin at vera settan. Síðani greiddi skrivari floksins, Helgi Abrahamsen, frá virkinum hjá landsfelagnum hjá Sambandsflokkinum.

Roknskapurin varð lagdur fram av Shcandorf Vang. Roknskapurin vísti eitt lítið hall, men felagið hevur eina lítla millión standandi.

Roknskapurin varð einmælt samtyktur.

### Jóhan nýggjur næstformaður

Næst á skránni var val av næstformanni landsfelagsins.

Kaj Leo varð afturvaldur uttan mótvalevni.

Tað mest spennandi punktið á skránni á landsfundi Sambandsfloksins, var val av næstformanni í Sambandsflokkinum.

Suðuroyar Sambandsfelag hevði heitt á Johan Dahl um at stilla upp til næstformann, og hann eftirlíkaði ynskinum.

Hvørki Alfred ella Jóhan tóku orðið, áðrenn valið fór fram. Atkvøðugreiðslan varð avgreidd skrivliga.

Fólk prátaðu spent, meðan atkvøðurnar vórðu taldar.

Eilif Samuelsen, orðstýrari, kunngjørdi, at Jóhan Dahl vann valið við 29 atkvøðum móti 17 til Alfred.

Alfred Olsen tók ósigurin virðiliga og takkaði fyri sína tíð sum næstformaður. Hann ynskti eisini Jóhan Dahl til lukku og góða eydnu.

Alfred nýtti eisini høvið til at takka Lisbeth fyri hennara arbeiði, nú hon ikki stillar upp aftur.

Eisini Jóhan tók orðið, og hann takkaði eisini Alfred fyri og segði seg vilja arbeiða fyri, at Sambandsflokkurin skal ganga fram.

Alfred Olsen:

## - Tað kostar at standa við sítt

**Alfred Olsen ásannar, at tað kostar at standa við sítt í politikki. Hann metir, at hansara støðufesti í samband politiska kjakið í seinastuni var ein av orsøkunum til, at hann tapti næstformansvalið**

NÆSTFORMANSVAL
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Alfred Olsen tók ósigurin virðiliga á landsfundinum hjá Sambandsflokkinum fríggjakvøldið, sum varð hildin í bygdarhúsinum í Hósvík.

Jóhan Dahl vann greitt við 29 atkvøðum móti 17 til Alfred.

Alfred Olsen ynskti Jóhan góða eydnu framyvir, og tók ósigurin virðiliga.

Sosialurin spurdi Alfred Olsen eftir fundin, um hann heldur, at Sambandsflokkurin revsar hann fyri, at hann hevur tikið stuðulin til samgonguna aftur.

- Eg vóni ikki, at tað er støðan, men eg kann einans ásanna, at mítt støðufesti í samband við €266b málið hevur kostað í dag, sigur Alfred.

Alfred ætlar sær tó ikki at taka seg úr flokkinum, tí at hann metir framvegis, at tað er pláss fyri honum.

- Tað kostar at standa fast við sítt, og tað má eg bara ásanna. Eg haldi, at tað er pláss fyri mær í Sambandsflokkinum. Eg standa fyri stevniskránni hjá Sambandsflokkinum, sum eisini sigur, at flokkurin vil føra politikk bygdan á kristna grundarlagið. Hesum standi eg inn fyri, sigur Alfred Olsen at enda.

Kaj Leo:

## - Alfred hevur altíð verið loyalur móti mær

**Formaðurin í Sambandsflokkinum, Kaj Leo Johannesen, segði á landsfundinum, at Alfred Olsen hevur altíð verið loyalur móti sær. Hann sær fram til at arbeiða saman við Jóhan Dahl**

SAMBANDSFLOKKURIN
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*



Mest umrødda punktið á landsfundinum hjá Sambandsflokkinum var næstformansvalið.

Formaðurin, Kaj Leo Johannesen, varð afturvaldur uttan mótvalevni. Sosialurin fekk orðið á formannin stutt eftir at tað gjørdist greitt, at Jóhan Dahl er nýggjur næstformaður í Sambandsflokkinum.

- Eg síggi fram til at arbeiða saman við Jóhan Dahl. Vit hava arbeitt saman fyrr, og eg vænti, at vit fáa eitt gott samstarv, sigur Kaj Leo.

Kaj Leo segði at fundinum, at Alfred Olsen hevur altíð verið loyalur. Tað eru tó nógv, sum halda, at hann hann var illoyalur móti flokkinum, tá ið hann tók stuðul sín til samgonguna aftur.

- Alfred Olsen hevur altíð verið loyalur móti mær. Tað er sjálvandi tað málið við samgonguni, sum eingin ordiliga skilir, men eg havi altíð havt hansara stuðul, sigur Kaj Leo.

- Helst verður Alfred revsaður nú fyri, at hann tók stuðulin til samgonguna aftur. Men vit takka honum fyri tíðina, og síggja fram til at hava Jóhan Dahl sum næstformann, sigur Kaj Leo at enda.